# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Farið eftir málunum

ÍtróttarFøroyar hava sanniliga gjørt bart fyrstu fýra dagarnar, sum kappast hevur verið á Rhodos. Í skrivandi løtu er støðan, at Føroyar hava vunnið flestu heiðursmerkini av øllum. Og líkamikið, hvussu leikur fer seinastu tveir kappingardagarnar, so stendur longu nú greitt, at talan er um so nógv tað besta úrslitið, sum Føroyar nakran tíð hava vunnið á oyggjaleikum.

Og vit onnur fáa illa gjørt annað, enn at boyggja okkum fyri fantastisku avrikunum hjá ítróttarfólkum okkara. Ikki minst, tí tey við hesum eisini eru ein fyrimynd fyri alt Føroya land í so nógvar mátar. Flestu teirra hava fyri fleiri árum síðani sett sær høg mál, og síðani hava tey miðvíst arbeitt fram móti hesum. Hundrað- og kanska túsundtals tímar eru nýttir til venjingar, soleiðis at avrikini stútt og støðugt eru betrað.

Og so verður einki petti lagt í, hvat søgan sigur, ella hvat onnur halda um tað, sum tey gera. Uttan at hetta skal skiljast sum arrogansa, so hava tey sett sær síni egnu mál, heldur enn at fara eftir málunum, sum onnur vilja seta upp fyri tey. Og við at leggja søguna til viks eina løtu, hava settu málini verið nógv hægri enn bara tað, sum onnur í Føroyum hava nátt undan teimum.

Í hesum visjónstíðum er hetta í øllum førum ein framferðarháttur, vit øll eiga at leggja í geyma. Ítróttarsambandið hevur fyri sín part sett sær sína egnu visjón 2015. Hetta er nevnliga oyramerkt sum árið, har Føroyar aftur skulu hýsa leikunum. Men tað krevur so, at ikki bara ítróttarfólkini, men eisini ÍSF, lands- og komunnunalir myndugleikar seta sær mál. Og ikki bara seta sær málini, men eisini arbeiða fram móti hesum við treiskni og toli.

Ítróttarfólkini hava longu víst vegin. Nú er tað upp til okkum onnur at prógva, at vit eisini kunnu fylgja við.

**Sosialurin**

## Suðuroyarfarleiðin í vanda

REIDAR NÓNFJALL



Skjótasta og mest regluliga sambandið til og frá Suðuroynni er ein undirsjóvartunnil – men av tí, at talan er um eina langsiktaða og sera stóra verkætlan, inngongur henda ikki í hesa viðgerð um ferjusamband millum Suðuroynna og Sandoynna og at koyra víðari í einum undirsjóvartunnli frá Sandoynni.

Gangi út frá, at suðuroyingar sum so onki hava í móti, at landið letur Sandoyingum ein tunnil til 700 mió.kr. – landsstýrið eigur bara at lata vera við at knýta hesa verkætlan til eitt ónýtuligt og vánaligt ferjusamband millum Hvalba og Sandoynna og víðari til Streymoynna.

Tað, sum landsstýrið ætlar, er at skapa eitt ferjusamband millum Hvalba og Sand og brúka eina minni ferju enn nýggi Smyril til henda flutning. Landsstýrið ætlar óiva eisini, at suðringar skulu tvingast til at vera við til at gjalda kostnaðarmikla undirsjóvartunnilin til Sandoynna.

Avleiðingarnar fyri suðringar at velja hesa loysn verða álvarsligar fyri tænastustøði á farleiðini. Tað, sum talar ímóti at skipa farleiðina umvegis Sandoynna, er:

Farleiðin millum Suðuroynna og Sandoynna er klassifiserað sum opið hav og harafturat hørð streymviðurskifti. Tí ber ikki til á hægstu vetrartíð í myrkri, kavaroki og stormi at hava eina minni ferju til flutningin – fólk fara heilt einfalt ikki at tora at sigla á farleiðini.

Flutningurin við fleiri knútapunktum og av- og áskipan fleiri ferðir, minkar munandi um tænastustøði. Td. noyðast suðringar við einari slíkri loysn fyrst at koyra til Hvalbiar, umborð á ferjuna, í land á Sandoynni og síðan koyra í 20 min. til Havnar ella miðstaðarøkið. Suðringar eiga heldur sum í dag at miðsavna fráferina á Tvøroyri og at krevja altíð at hava høvuðsstaðin sum endastøð.

Hvalbiarfjørður er hættisligur at sigla inn og út eftir í ringum veðri – so ein minni ferja hevði havt sera nógvar avlýsingar og seinkingar í 8-9 mánaðir av árinum. Ein størri ferja kann ikki brúkast at sigla inn og út eftir Hvalbiarfirði - uttan kanska ovurstórar íløgur.

Samanumtikið er skjótasta og besta flutningsskipanin hjá ferðandi og vinnuni í Suðuroy, ein sigling av Tvøroyri og beinleiðis til Havnar – hetta eigur at haldast fast um líka til ein tunnil kann binda suðuroynna landfast saman við restini av Føroyum.

Landsstýrið er ógvuliga upptikið av at senda ferðaætlanina út til ummælis til tey ferðandi. Hví verða td. sjókønu fólkini á Smyrli ikki tikin við uppá ráð, áðrenn arbeitt verður víðari við hesum ørvitisætlanum, um umlegging av suðuroyarfarleiðini.

Ætlanin um flogvøll á Sandoynni er eftir mínari meting einasta forsvarliga argumentið fyri at byggja ein so kostnaðarmiklan tunnil til Sandoynna, men latið verða við at knýta suðuroyarfarleiðina uppá hesa verkætlan.

Tað hevur gjøgnum seinastu nógvu árini verið tosað og kjakast um, hvussu flutningssambandið á suðuroyarfarleiðini best kann skipast. Loysnirnar, sum eru havdar á lofti, hava verið nógvar og ymiskar. Ein aktuel loysn er at knýta Suðuroynna uppí Sandoynna við einum ferjusambandi úr Hvalba, um so er, at ein undirsjóvartunnil til Sandoynna gerst veruleiki. Fyri suðuroyingar verður hetta ein sera vánalig loysn og eitt stórt afturstig í flutningstænastuni.

Tey fólk, sum hava sett hesa loysnina fram, vita heilt einfalt ikki, hvat tey tosa um og taka onga hædd fyri, hvussu veður og vindur er á farleiðini – talan er meira um eina skriviborðsloysn av fólkum, sum ganga á sløttum og fast undir fótum til dagligt.

## Atlants Tøkni vorðin partur av Senta

TÍÐINDASKRIV

Fyrr í ár var stór samanlegging í føroysku KT-vinnuni, tá ið samtakið NEMA keypti og legði saman fyritøkurnar Farodane og ComData og kallaði tær Senta. Nú hevur Senta fingið munandi styrk við førleikamikla Atlants Tøkni.

- Við at gera dugnaligu starvsfólkini í Atlants Tøkni til part av Senta, er Senta konsoliderað við munandi meiri vitan, og styrkt er almikið um menningarpartin í fyritøkuni, soleiðis at hon nú kann bjóða eina fullfiggjaða tænastuviftu til alt tað føroyska vinnulívið og til privatkundar," siga Rolf Herup Olsen og Christian Nagata, stjórar í Nema.

Nýggja átakið er eisini ein umráðandi liður í vakstrarætlanunum hjá Senta og týðandi táttur í at styrkja um marknaðarstøðuna hjá fyritøkuni, bæði í Føroyum og uttanlands.

Atlants Tøkni er ráðgevingar- og menningarfyritøka og varð stovnsett í 2001. Fyritøkan hevur í virki sínum lagt dent á at veita umsitingarligar og tøkniligar KT-loysnir av bestu dygd og hevur verið í støðugum vøkstri síðan byrjan.

"Vit brenna fyri at menna dygdarloysnir. Saman við Senta fáa vit betri møguleikar at veita størri og enn betri loysnir, eins og vit styrkja um sølu og marknaðarliðið," sigur Yngvi S. Guttesen, nevndarformaður í Atlants Tøkni.

Atlants Tøkni hevur ment fleiri størri skipanir fyri stovnar og fyritøkur í Føroyum og uttanlands. Nevnast kunnu t.d. "Fíggjarlógarskipan landsins," ið er karmur um alt fíggjarlógararbeiði løgtingsins, "Føroya sporførisskipan," ið er stýrikervi fyri sporførisupplýsingum í fiskivinnuni, og "Nøglan," ið er støðið undir øllum vøru- og tænastuveitingum hjá Føroya Tele. Nøglan vann heiðurin "Ársins talgilding" í 2005.

Fram til í dag hava starvast 13 serfrøðingar á fyritøkuni, allir við hægri útbúgving á sínum øki. Hesir verða nú samrunnin partur Senta og ein sjálvsagdur liður í framtíðar menningini hjá einari av Føroya størstu og fremstu KT fyritøkunum í Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.